## Til reiðar at fara frá

Forsætisráðharrin í suðuramerikanska landinum Peru, Yehude Simon, segði í gjárkvøldið, at hann ætlar sær at fara frá um nakrar vikur. Hann legði afturat, at hann fer at leggja frá sær, tá viðurskiftini í Peru eru komin aftur í rættlag. Við hesum sipaði hann til ógvusligar samanbrestir, sum hava verið millum løgregluna og indiánar í Peru í seinastuni. Indianskir felagsskapir krevja, at stjórnin skal ógilda nakrar lógir, sum hava til endamáls at fáa útlendskar fyritøkur at gera íløgur í økinum við Amazon-ánna, har indianarnir búgva. Fyri hálvari aðru viku síðani brustu indiánar og løgreglan saman, og tað endaði við, at minst 34 fólk lógu eftirá, skrivar AP úr Lima.



## Ferðamannaskip í karantenu

Eitt ferðamannaskip við næstan 1.700 fólkum umborð er sett í influensakarantenu orsakað av svínakríminum H1N1. Tað eru myndugleikarnir í Venesuela, sum hava sett ella rættari sagt lagt ferðamannaskipið Ocean Dream í karantenu. Orsøkin er, at kanningar hava staðfest, at trý av manningini eru smittað við svínakrími, og 11 onnur hava sjúkutekin, ið minna um sjúkuna. Tí hava myndugleikarnir gjørt av at halda skipinum aftur í 10 dagar. Tað eru 1.219 ferðafólk við Ocean Dream, og manningin telur 460. Øll eru umborð á skipinum, sum liggur fyri akkeri úti fyri Isla Margerita í Venesuela.

# mammu



*Jórun Høgnesen og Mikkjal Joensen við Sigrið ímillum sín*

á, og nógv vinarbond blivu knýtt, sigur Sigrið.

### Nýra frá mammu

Jórun ivaðist onga løtu, tá dóttrini tørvaði eitt nýtt nýra. Eins og pápin, Mikkjal, við gleði læt annað av sínum nýrum, so gjørdi Jórun tað eisini. Hesaferð var tó ikki neyðugt at kjakast og velja, tí nú var bert ein møguleiki eftir.

- Eg byrjaði so tær drúgvu og gjølligu kanningarnar og tók tær mongu royndirnar sum skuldu endaliga staðfesta, at eg var egnað sum donor til Sigrið. Læknarnir ynsktu, at tað skuldi ganga rímiliga skjótt fyri seg, so Sigrið slapp undan at fara undir dialysuviðgerð, sigur Jórun Høgnesen.

Hon gekk tí allar kanningar og royndir ígjøgnum, og 3. apríl varð so skurðviðgerðin framd.

Nú eru øll aftur í Føroyum, og Jórun og Sigrið eru um at koma rættiliga fyri seg eftir skurðviðgerðina.

- Eg havi sjálvandi mist meginpartin av várinum í skúlanum, og verði tí noydd at ganga árið um aftur. Ella má eg taka fakini gjøgnum summarið. Burtursæð frá tí merkir hetta ikki tað stóra, sigur Sigrið Mikkjalsdóttir Joensen, sum er fegin um, at hon nú aftur kann liva eitt vanligt lív.

Heldur ikki Jórun angrar eina løtu, at hon gjørdi av at geva dóttrini annað nýrað.

- Tvørtur ímóti, so eri eg sera takksom fyri, at hetta kundi lata seg gera. Tú ivast ikki, tá tú á ein slíkan hátt kann geva barni tínum eitt betri lív, sigur Jórun Høgnesen.

Mikkjal Joensen er samdur, og tey eru bæði fegin um, at kunna hava givið dóttrini hvør sítt nýtt nýra.

Og Sigrið livir sanniliga eitt lættari lív. Hon hevur jú fingið nýru frá babba og mammu. Og hetta vikuskifti fer hon í summarhús á bygd saman við vinkonunum.